# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Ætlanin hjá amerikanarunum at myrða al-Sadr er bara eitt av fleiri tiltøkum, sum hava gjørt ilt verri (Mowaffaq Rubai).*

# Royndu at myrða al-Sadr

**Fyri trimum árum síðani royndu amerikanararnir at myrða irakska leiðaran Moqtada al-Sadr.**

-Amerikanska ætlanin gjørdi, at al-Sadr misti alt álit á amerikanarunum og teimum útlendsku herdeildunum, sigur trygdarráðgevin hjá iraksku stjórnini, Mowaffaq Rubai, við bretska blaðið The Independent.

Tað var í august í 2004, at amerikanararnir gjørdu av at beina fyri tí víðgongda shismulsimska leiðaranum Moqrada al-Sadr. Um hetta mundið vóru harðir bardagar millum menn hjá al-Sadr og amerikanskar hermenn í býnum Najaf, men tað eydnaðist iraksku stjórnini at fáa al-Sadr at ganga við til samráðingar. Fundurin skuldi haldast í einum ávísum húsum, men amerikanska herleiðslan gjørdi av at beina fyri tí stríðsfúsa leiðaranum. Tí bumbaðu amerikanararnir húsini, og løtu seinni søktu amerikanskir hermenn at tí. Men ætlanin miseydnaðist, tí tað vísti seg, at al-Sadr var seinkaður, so hann var ikki komin á fundin enn.

-Amerikanararnir ætlaðu at brúka samráðingarnar í Najaf til at fáa tann annars sera varna al-Sadr í felluna, sigur Mowaffaq Rubai við The Independent.

Sambært blaðnum er hetta ikki einastu ferð, at amerikanska herleiðslan í Irak hevur tikið stig, sum hava gjørt støðuna uppaftur verri.



# "Cutty Sark" fór upp í royk

**Tað heimskenda, enska seglskipið kolaðist upp tíðliga í morgun.**



Einaferð var "Cutty Sark" tað skjótasta seglskipið, sum sigldi við farmi á heimshøvunum, men nú er bara øska eftir í dokkini í Greenwich, har skipið hevur staðið tey seinastu 53 árini.

Tað var klokkan hálvgum seks í morgun, at løgreglan í London fekk boð um, at eldur var tí kenda skipinum, og hóast sløkkiliðið gjørdi sítt ítarsta fyri at fáa tamarhald á eldinum, eydnaðist tað ikki. Einar tveir tímar seinni bleiv staðfest, at "Cutty Sark" var kolað upp.

Tað kenda seglskipið varð smíðað í Dumbarton í Skotlandi í 1860'árunum og latið eigarunum tann 23. november í 1869. Borðini vóru úr træi, men bondini úr jarni. Tey fyrstu árini sigldi skipið millum Bretland og Kina við farmi, og seinni fór tað at sigla millum Bretland og Avstralia. Tað var eitt av heimsins skjótastu seglskipum, sum sigldu við farmi um tað mundið.

Í 1954 bleiv "Cutty Sark" sett í eina turrdokk hjá flotasavninum í London, og øll árini síðani hevur tað verið eitt av teimum best umtóktu ferðamálunum í býnum. Í fjør varð farið undir at umvæla skipið fyri næstan 270 mió. krónur, og ætlandi skuldi tað latast upp aftur fyri ferðafólki í 2009.

## STUTT SAGT

## Politikari skotin

Tjóðskaparligi andstøðuleiðarin í Georgia, Guram Sharadse, varð myrdur í høvuðsstaðnum Tblisi í gjár. Sharadse var formaður í einum konservativum flokki, og hann var harðliga ímóti, at Georgia skuldi hava ov tætt samband við Vesturheimin. Georgiska løgreglan sigur, at ein maður bleiv tikin stutt eftir morðið í gjár, og at hann er undir illgruna fyri at hava skotið tey fimm skotini, sum beindu fyri leiðaranum. Hetta er aðru ferð í ein mánað, at ein andstøðupolitikari verður myrdur í Georgia. Tann 19. apríl myrdi onkur Guela Meladse. Eisini hann varð raktur av fimm skotum.

## Málið í lagi

Fyrrverandi ST-vápnaeftirlitsmaðurin Hans Blix sigur seg ivast í, at handilstiltøk og diplomatisk tiltøk kunnu noyða Iran at sleppa sínum kjarnorkuætlanum. Við norsku tíðindastovuna NTB sigur sviin, at hann tekur av fullum huga undir við kravinum um, at Iran skal sleppa sínum ætlanum á kjarnorkuøkinum, men at trýst neyvan er tann rætti vegurin at ganga. Tað er serliga amerikanska stjórnin, sum vil hava umheimin at seta tiltøk í verk ímóti Iran fyri at herða trýstið á landið.

## Leggja frá sær

Ein gøla í ungarsku løgregluni kostaði í gjár løgmálaráðharranum, Jozef Petrei, ráðharrasessin, samstundis sum fleiri leiðandi embætisfólk í løgregluni hava mist arbeiðið. Upprunin er eitt mál, har fýra løgreglumenn eru skuldsettir fyri at hava neyðtikið eina unga kvinnu, sum teir steðgaðu í einum ferðslueftirliti. Nú hevur stjórnin gjørt av at kanna løgregluna til botns, og umfram løgmálaráðharran eru landsins løgregluovastiog løgregluovastin í høvuðsstaðnum Budapest farnir úr sínum størvum.